# G! 2005

Sosialurin á G!
Myndir:
Jens Kristian Vang
Bárður Lydersen
Àlvur Haraldsen
Ólavur Frederiksen

## Perfekt Kvamm







**Tað ber illa til at vera eins tjekkaður sum Simon Kvamm. Spyr bara tey, sum vóru á G! leygarkvøldið**


UMMÆLI
Heri á Rógvi
heri@sosialurin.fo


En wanna be Darth Vader sungu Nephew, 200 og nógvar ferðir 200 fleiri á Gøtusandi.

Trúgvi heldur, at tey flestu kundu hugsað sær at vera Simon Kvamm. Hann er bara eitt nummar for feitur, um vit kunnu loyva okkum at siga soleiðis. Valdur til besta sangara, lekrasta og stuttligasta mann í Danmark og nú eisini heimsins feitasti kvarti føroyingur. Tað fær illa verið betri. Hann nærkaðist av álvara tí fullkomna. Helst tann sterkasti forsangarin, vit hava sæð og hoyrt í Føroyum. Og so var bólkurin óluksáliga góður eisini.

Meini so við, maðurin steðgar leingi í Føroyum, hann ger sjálvur klárt á pallinum, takkar persónum við navni og teir spæla ófatiliga væl. Jú, hetta er mestur tað mest positiva ummæli, tit fara at lesa leingi. Tað hevði frøtt mítt ónda hjarta, at spilt framførsluna út, men tað vildi verið ein deyðsynd.

Frá fyrstu løtu var tað feitt. Fólk vóru klár við svørðum og twix. Annleggið var um at bresta. Við ekkó og einum ljóði í serflokki byrjaði alt við eitt brak. Hetta var nakað serligt. Sjálvt tey vanligu føroysku suck-up orðini vóru nakað størri og meira enn vanligt. Teir fyrstu sangirnar kendu fólk ikki, men tað var meistarliga væl spælt. Tekur eina løtu at venja seg við ljóði, men øll sum ein kundu hugsað sær at átt ein systur- ella bróðurson á pallinum.

Tað larmaði, íldi og osaði av nøkrum stórum frá byrjan til enda. Sangirnir vóru so at siga allir av USADSB fløguni, undantikið Byens hotel hjá Kim Larsen, sum bólkurin hevur innspælt í samband við ein serútgávu. Tað løgna var, at tað vóru í roynd og veru ikki teir mest upplagdu sangirnir, Movie Klip, Superliga osfr., sum fólk bíðaðu eftir og vildu syngja við til. Danin vann á svianum á Gøtusandi. Tað var tungt, rokkut og spælt við dirvi. At kalla Toda Jónsson bíttan framman fyri túsundavís av føroyingum krevur dirvi. Men tað gjørdi Nephew uttan víðari, og fólk byrjaðu spakuliga at fanga heimin aftan fyri tekstirnar hjá Nephew.

Nephew var bara tað allarbesta leygarkvøldið. Tað var UG! og alt hatta har.

Jú, har vóru ymsir feilir. Intensiteturin av pallinum hevði ógvuliga skiftandi ávirkan á stóru áhoyrarafjøldini. Tað skyldast uttan iva eisini, at fólk ikki eru so von við at ganga til tílíkar konsertir. Fjøldin gjørdist køld til tíðir, men tað tekur einki frá heildarmetingini.

Tað kundi illa verið betri eitt ljóst leygarkvøld á Gøtusandi.



## 200% ektaður punkur

**200 gjørdi sítt ting á G! Tað var punk og longsti fingur til Miðflokkin. Og fólkið elskaði tað**


UMMÆLI
Heri á Rógvi
heri@sosialurin.fo


Skuldi nakar verið í iva um, at fólk í Føroyum hava tikið 200 til sín, so vóru tey ikki á Gøtusandi fríggjakvøldið.

200 punkaði við øllum teirra skitna tilfari og góvu stóra papmaché fingurin til Miðflokkin og onnur, sum teimum ikki dámar. Og fólkið elskaði tað

Ektaður punk tónleikur á G!

Tað var í roynd og veru ein feit framførsla. Rátt og gott. Fyri einum ári síðani høvdu neyvan kunna savnað helvtina so nógv fólk, men fríggjakvøldið vildu øll fylgja við.

Haldi ikki at sangarin eigur nakra einglarødd. Haldi eisini, at teirra framførsla var alt ov einstáttað. Men teir eru, hvat teir eru, og teir gjørdu tað heilt fantiska gott. Einki at seta fingurin á. Teir hava okkurt upp á hjarta, og tað er ofta saknur á boðskapum hjá føroyskum bólkum. Her skal ikki so nógv tulking til fyri at skilja.

Tekstirnir eru nærgangandi, og tú mást veruliga spyrja teg sjálvan, um tað er at fara út um mark at fara soleiðis við fólki í tekstunum. Man kann dáma tað ella lata vera. Vit geva teimum hesaferð tveir positivar tumlar fyri at gera sítt.